## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin var ikki ímóti Atlantic Airways

### (Spurningar til Áka Andreasen)

**Helgi Abrahamsen**



Tann 18. august í fjør, hevði Áki Andreasen eina grein í bløðunum, har hann pástóð, at Sambandsflokkurin hevði arbeitt ímóti at Atlantic Airways kom upp í Føroyaflúgvingina. Hann segði millum annað, at Atlantic Airways hevur ongantíð verið nakað hjartabarn hjá Sambandsflokkinum, og at Sambandsflokkurin hevði veitt áhaldandi mótstøðu ímóti Atlantis Airways.

**Samsvaraði ikki við Løgtingstíðindi**

Eftir at hava lisið greinina, leitaði eg í Løgtingstíðindum, men fann einki har sum bendi á, at Sambandsflokkurin hevði verið ímóti, at føroyingar komu upp í millumlandaflúgvingina.

Í Løgtingstíðindum sást, at tá partafelagið Atlantic Airways varð sett á stovn í 1987, varð lógaruppskot lagt fyri tingið, har biðið varð um heimild at seta 1,02 mió. krónur í partapeningi í felagið, og hesum tók Sambandsflokkurin undir við. Í mars 1989 varð biðið um landskassaveðhald á 75 mió. krónur til P/F Atlantic Airways, og eisini tí uppskotinum tók Sambandsflokkurin undir við.

Eg spurdi tí Áka Andreasen í eini blaðgrein, hvat hann bygdi pástandin á, tá hann segði, at Sambandsflokkurin stríddist ímóti Atlantic Airways, men eg fekk einki svar.

**Endurtøka av ósannindum**

Nú, eitt hálvt ár seinni, síggi eg, at Áki er farin at endurtaka pástandin, sum hann hevði í bløðunum fyri hálvum ári síðani, og sum hann tá ikki kundi prógva. Nú skrivar hann millum annað um "illviljan móti Atlantic Airways sum eyðkennir Sambandsflokkin".

Eg fari tí at endurtaka spurningin, sum eg setti í august 2004, og vóni, at Áki hesa ferð kemur við einum svari. Spurningurin var soljóðandi: Hvat byggir Áki Andreasen pástandin á, tá hann sigur, at Sambandsflokkurin stríddist ímóti Atlantic Airways? Somuleiðis vil eg út frá nýggjastu greinini hjá Áka spyrja, um hann gongur inn fyri, at føroyskt vinnulív fær varandi rakstrarstuðul úr Landskassanum ?

Svar ynskist !

# Viðm. til greinina »Umsetiligheitin skal tálmast«

**Anfinn Olsen**

Síggi í Sosialinum nr. 24 frá 4. feb. 2005 at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum Bjørn Kalsø sigur, at hann hevur sett eina arbeiðsætlan í trimum punktum í verk. Hann hevur sett sær fyri at:

- gera eina grundiga gjøgnumgongd av lógini um vinnuligan fiskiskap.
- Kann veiðitrýst og veiðuorku.
- Tálma umstiligheitina av fiskiloyvum og fiskidøgum.

Til tey bæði fyrstu punktini eri eg púra samdur.

Lógin um vinnuligan fiskiskap hevur verið ígjøgnum fleiri broytingar hesi 10 árini hon hevur verið í gildi, og møguligar broytingar, ið tit nú fara at gera, um gjøgnumgongdin vísir at hetta er neyðugt, verða neyvan tær seinastu broytingarnar ið verða gjørdar í hesari lóg.

Tað at vit hava eina fiskidagaskipan ger, at tað er ein íbygd eggjan til skipini til at gera hvønn fiskidag so effektivan sum møguligt. Við royndum og nýggjum teknikki vilja skipini, alt annað líka, gera hvønn fiskidag effektivari og effektivari, so hvørt sum árini líða.

Tað triðja punktið er at »tálma umsetiligheitina av fiskiloyvum og fiskidøgum«. Um tað verður soleiðis, at gjøgnumgongdin av teimum báðum fyrstu punktunum vísir, at niðurskurðurin, ið higartil hevur verið, (uml. 20% síðan lógin kom í gildi) ikki er nóg mikið, tí at skipini hava effektivisera hvønn fiskidag meir enn niðurskurðin. Um fiskidagarnir skulu niðurskerjast meira, fyri at náa einum sokallaðum burðardyggum lutfalli (býti) millum veiðitrýst (fiskidagar) og fiskastovnar, so uppstendur ein heilt nýggj og trongd støða hjá hvørjum einasta fiskiloyvi (fiskiskipi) við Føroyar.

Her hevði verið natúrligt, at feløg við slíkum fiskiloyvum, stungu fingurin í jørðina og gjørdu sína støðu upp. Antin við at erstatta teir burturreguleraðu fiskidagarnar við at keypa aðrar fiskidagar frá øðrum fiskiloyvum,og á henda hátt tryggja mannskapi og skipi somu inntøkumøguleikar sum áður. Ella við at komið verður til móttsattu niðurstøðu ið er, at felagið gevst (minkar) við sínum fiskaríið og selur sínar fiskidagar til onnur feløg. Hetta vil gerra, at felagið ið selur, fær fíggjarorku til at avvikla sín fiskaríaktivitet, og feløgini sum keypa, halda á fram við somu heilársdrift sum áður.

Góði Bjørn: Neyðug hýra til hvønn einstakan fiskimann, rakstrarkostnaður saman við rentum og avdrøgum hjá fiskiskipunum minka ikki fyri tað, at fiskidagarnir verða reguleraðir niðureftir. Tak tí ikki frægasta tillagingarmøguleikan frá okkum, um fiskimálastýrið fer at gjøgnumføra nýggjar niðurskurðir í fiskidøgunum við at tálma umsetiligheitina.

# Vísindaligt svik er eisini svik

**Páll Poulsen**



Seinastu árini er eitt politiskt lyklarorð komið í ljósmála. Gransking. Vit granska allastaðni. Í útjaðarinum (har eingin vil búgva), onkur granskar í mikrostatum, og onkur økonomur samanber føroyska búskapin við alt Norður-Amerika.

Hermann Oskarsson hevur sitið í búskaparráðnum og proklamerað at vit koma at hava tað fínt um 20 ár. Harumframt hevur hann sent mótstríðandi upplýsingar út, bæði fyri og aftaná nýggjár 2004.

Nýggjasti limurin í "sannleikans ministerium", er ein almennur stjóri, sum ikki hevur hildið játtanina í 2 ár. Tað man neyvan vera tilvild at H. C. Andersen verður heiðraður á sínum 200 ára degi. Hvør kennir ikki ævintýrið um "Nýggju klæði keisarans."

Á Setrinum eru tilsamans 4 Ph. D ritgerðir útgivnar sum vísindaligar, hóast tær ikki klára minstu krøv um operationalisering og problemformulering í vísindaligum høpi.

Fellan hesi fólk eru rokin í, er integritetsloysið. Tey halda at tað kann vera líkamikið, tí teirra egnu fólk sita á heimastýrismaktini og definitiónsrættinum. Vit vita frá gomlum døgum um valdsmisnýtslu, antin tað er í Stalin Russlandi ella tí lítla Ceausescu stýrinum í Rumenia, at maktin redefinerar fólk, tá ið tey gerast ein hóttan ímóti maktini. Kona Ceausescu var doktari í kemi, sjálvt um hon ikki kendi frymilin á vatni. Hon hevði heldur ikki gingið klassiska vegin, við royndum, innsavning og deduktión. Nei, hon var kona Ceausescu, tí gjørdist hon doktari. Føroyska Ph. D heitið í dag samsvarar best við teir riddarakrossar danir hongdu uppá naivar føroyingar, sum runnu ørindi fyri teir. Tá ið deduktión verður til tað øvugta, nevniliga tautologi, verða fólk ør í høvdinum. Hyggið bara at professarakonunum, sum halda at tær við eitt eru gandaðar til listakvinnur.

Orsøkin til at vísindateoriin skilir millum deduktiónina, tað sum kann hugsast og tautologi hinumegin, vit siga at tað er soleiðis, er tí at vísindafólk ongantíð eiga at vera í iva hvat tað merkir. Tey eiga eiheldur at ivast í teirra egna leikluti í granskingini, tí tað ringasta sum kann henda, er at tey sjálvi gerast trupulleikin í granskingini, við at mála seg upp í ein krók.

**Fyribrigdið Pál Weihe.**

Pál Weihe er sjálvur endaður sum eitt sera áhugavert granskingarobjekt. Tá hann í 1985 lendi í Føroyum kom kyksilvurið yvir hann, sum ein opinbering. Minnist meg rætt hevur onkur sagt at grønlendingar ikki skulu gevast við at eta kóp, ísbjarnir o.a.t. tí tað rakar teirra mentan ov hart.

Seta vit hetta "scenario" upp at føroyingar ikki mugu eta grind, fisk og fugl, hvørjum skulu vit so liva av?

Hvat um tað veruliga passar at Al Gore, Pávin í Rom, George Bush og allir hinir hava "name droppað" Pál Weihe so ofta í altjóða høpi, at fólk trúgva honum?

Allir veruligir granskarar vita at størsti trupulleikin er at teir sjálvir kunnu gerast trupulleikin, men so effektivt og "vísindaliga" at brúka heimastýriskar maktmekanismur til at "granska" seg fram til at føroyingar ikki skulu útflyta fisk, tað gongur yvir mítt vit.

Lærupeningurin av Ceausescutíðini var at samfelagið var alt ov langt úti at koyra. Flestu fyribrigdi framleiða av góðum grundum eina sjálvsmynd. Henda sjálvsmynd skal eisini halda "úteftir". Fyribrigdini gera eisini alt fyri at alt skal "passa saman." T.d. klippa og kuta í søgubókum, tí eingin torir at siga, at tað "maktin" sigur, tað er annað enn óreingiligur sannleiki.

Í Rumenia koyrdi Ceausescu nógv uppá at hann var "dissidenturin", sum talaði Moskva mitt imot. Men tann peningur hann fekk í statskassan, bleiv bert brúktur til at framleiða og pussa sjálvsmyndina og tey sum ivaðust í tí sum statssjónvarpið segði, tey vóru løgin. Irrationalitetur gjørdist rationalitetur í landinum. Securitate fór eftir fólki sum hugsaðu sjálvstøðugt.

Soleiðis gekk tað frá 1968 til 1989, tá ið fólkið hevði fingið nokk av hesum kvaksalvaranum, sum m.a. prýddi seg við danska elefantordaninum.

Er tað sjónleik tað snýr seg um, áttu teir heldur at sett Sjúrð Skaale í búskaparráðið. Hann dugir at spæla sjónleik.

Ókultururin verður enn sum áður vardur av Útvarpi Føroya. Tað einasta áhugaverda við hesum mikrofonhaldarunum, er at teir klára í flestu førum akkurát at koma uppá eitt støði, har teir útstilla teirra egnu óvitan. Longur er tann søgan ikki.

Tá ið staturin hjá Ceausescu ikki longur hevði ráð at keypa olju, broyttu teir bara termometrið. Sjálvt tá ið tað frysti, vóru almennu hitastigini 16 stig og tey, sum hoyrdu til, tosaðu um sól og summar.

# Góði Gerhard

**Sólvit Simonsen**



Sannleikin verður sjáldan væl lýddur.

Annars kann eg ikki annað, enn at siga tær hjartans tøkk fyri tað fólkaligu og siðiligu viðgerð av mínum persóni í bløðunum.